# Hilmar Bech 75 ár

Tann 19. juli verður ein vælkendur porkeningur, Hilmar Bech, 75 ár. Mamman Johanna F Jensen var av Dul á Strondum og pápin Jacob M Bech var úr Porkeri. Tær vóru tvær systrar, Johanna og Malena, sum fóru ungar til Suðuroyar, har tær giftust. Tá var hetta nærum heimsins endi. Suðuroyggin var tá so langt burtur, at beiggi teirra Jógvan, pápi tey á Dul, kallaði tær upp, nú hann ikki roknaði við at síggja tær aftur! Dóttirin varð kallað Johanna Malena. Tað var hon, sum seinni giftist við Hans Sundstein. Jacob og Johanna fingu 10 børn. Systirin Malena giftist við Zacharias á Hólunum, sum var beiggi Jacob. Tey fingu fimm børn. Tískil vóru teirra børn dupult systkinabørn.



Hilmar tók prelimineprógv frá Vágs skúla í 1951. Hann róði út og var eisini onkran túr til skips. Á sumri 1951 var hann í handlinum hjá Grønlandsfelagnum í Føroyingahavnini, sum flýggjaði út skipsútgerð. Har kundu fiskimenn eisini keypa útgerð.

Í august 1953 fór Hilmar á Haslev Seminarium, har hann tók læraraprógv í 1958. Skúlaárið 1958/59 var hann vikarur í Vági. Restina av sínum arbeiðslívi hevur hann virkað sum lærari í Porkeri, og frá 1. august 1967 varð hann fyrstilærari. Sum lærari var Hilmar væl umtóktur. Sagt verður, at hann var strangur. Tað er nú ikki nøkur ódygd. Hann dugdi væl við børnunum, og hann dugdi eisini væl at læra frá sær. Ein nú tilkomin í porkeningur greiðir frá, hvussu Hilmar einaferð gav honum eitt sjálvsálit, sum honum og øðrum kanska tørvaði. Hilmar sendi hann eitt ørindi við orðunum: “Tú er jú so skilagóður.” Ikki skuldi meira til, at hann føldi hetta sum eitt herðaklapp.

Eitt eyðkenni fyri Hilmar var eisini, at hann framvegis var áhugaður fyri næmingunum eftir, at teir vóru farnir úr skúlanum.

Hilmar er søgufróður maður. Hann hevur savnað nógv tilfar um Porkeris søgu, og hann var heimildarmaður hjá Páll Nolsøe í samband við skrivingina av skipasøguni hjá Porkeri í Føroya Siglingarsøgu. Hesin partur av okkara skipasøgu og fiskimannasøgu er nú heldur ikki so lítil.

### Virðiligur tingmaður

Hilmar varð valdur inn á ting fyri javnaðarflokkin í 1970, og hann var tingmaður fram til 1984. Hann var tingskrivari 1974-78 og løgtingsformaður 1979-80.

Sum løgtingsmaður kom Hilmar at taka arvin upp eftir Johan Danbjørg, sum hevði myndað javnaðarflokkin í ártíggir. Hetta var ikki minst í Porkeri, har javnaðarflokkurin var nógv størstur uppá seg og hevði meira enn helvtina av atkvøðunum. Hilmar var nú øðrvísi persónur enn Danbjørg. Men porkeningar høvdu eisini álit á honum. Flokkurin helt tørn aftaná Danbjørg, hóast tað ikki var nøkur sjálvfylgja. Hilmar gavst í politikki, men framvegis er tað javnaðarflokkurin, sum er fremsti flokkurin hjá porkeningum.

Hilmar var við til at mynda flokkin frá fyrst í 70-unum saman við politikarum sum Atla Dam, Jákup Frederik Øregaard, Haldor Hansen, Jákup Lindenskov, Jonu Hendriksen og Tórálv Mohr Olsen. Hann umboðaði javnaðarflokkin í løgtingsnevndum sum skattanevndini, fíggjarnevndini, skúlanevndini, vega- og havnanevndini, sosialu nevnd og kirkjunevndini.

Hilmar var ein virðiligur tingmaður. Tað var lurtað eftir honum, tá ið hann tók orðið. Hann var altíð væl fyrireikaður, og tað var skil í tí hann segði. Tað var kent, at Hilmar var virkin missiónsmaður. Hetta sást eisini aftur í hansara hugburð og siðiligu medferð.

Hilmar hevur havt fleiri týðandi nevndarsessir uttan fyri tingið. Hann var í stýrinum fyri ALV 1972-2000. Hetta samsvaraði væl við hansara áhuga fyri teimum, sum vóru minni væl fyri í samfelagnum. Her kom hann at samstarva við Karolinu Petersen, stríðskvinnuna á hesum øki. Hilmar var í nevndini fyri Tryggingarsambandið 1985-95. Hann var eisini í stýrinum fyri Húsalánsgrunnin í seks ár frá seinast í 70-unum og inn í 80-ini. Eisini hevur hann verið nevndarlimur í Ílegginargrunninum fyri Føroyar.

Hilmar hevur verið virkin í bygdalívinum. Í november 1967 gjørdist hann deknur í Porkeri, og hann hevur verið limur í kirkjuráðnum. Eitt skeið, 1963-1966, var hann limur í sóknarstýrinum í Porkeri.

Hann verið formaður í minnisvarðanevndini í Porkeri, og hann hevur verið í valstýrinum í 30 ár. Hilmar fylgir væl við tí sum hendir. Honum dámar eisini væl at fara á flot. Hilmar er eisini beinasamur hjá bygdafólki at heita á, um okkurt er sum skal greiðast. Eisini dugur hann væl at yrkja, sum eisini sæst aftur í brúdleypum og líknandi í bygdini.

Hilmar giftist 15. februar 1958 við Kristinu f. Samuelsen, ættað úr Haldarsvík og uppvaksin í Tjørnuvík. Tey eiga børnini Johanna, gift við Mannbjørn Olsen og Dan giftur Elken. Bæði børnini búgva í Porkeri. Hvørt av børnunum eiga trý børn, so barnabørnini eru seks í tali.

Kristina hevur arbeitt á flakavirkinum í Vági og roykivirkinum í Porkeri, ta tíð tað var.

Sigast kann um tey bæði, at tey eru sera dámlig og fyrikomandi. Vit hava upprunaliga kenst frá politikkinum, men framvegis er tað stuttligt at hitta tey og hvørja ferð at fáa eitt hugaligt prát.

Hilmar er burturstaddur føðingardagin. Honum verður ynskt hjartaliga tillukku við føðingardegnum, og hóast tað er nakað seint verður eisini ynskt teimum báðum tillukku við gullbrúðleypinum sum var fyrr í ár.

ó.

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Heindrikkur Hansen**, ættaður úr Svínoy, andaðist sunnudagin 6. juli í Lemvig, 63 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Bergtóra Vágsheyg** Niclasen úr Klaksvík, vanliga nevnd Begga hjá Jógvan Segl, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi týsdagin, 90 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin klokkan 18:00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 14:00.

---

Viðmerking:

# Bíblian innblást av Gudi – ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN.



### Tríatiundi fyrsti partur

Vit sóu seinast, hvussu judamenn komu heimaftur til landið. Hetta var lyfti Guds til fólkið. Juda var tó ikki eitt kongaríki nú, men ein landspartur undir heidnum kongum. Teit byrjaðu at byggja templið uppaftur, vóru steðgaðir, men eftir at Haggai eggjaði fólkið, eftir boði frá Harranum,at fara undir byggingina aftur, fóru teir í gongd aftur og fullførdu arbeiðið eftir fýra árum.

Hin ríki kongurin, Sálomo, brúkti sjey ár um at byggja hitt fyrra templið, og hóast at hetta seinra templið ikki kundi metast við hitt fyrra, so var hetta helst eitt bragd teir gjørdu. Tey vóru einans 42000 fátæk fólk, komin heim aftur úr trælabandi í Bábel.

Hóast at tempul Sálomos var ein príðuligari bygningur enn hetta templið, so sigur Haggai hetta:

Hetta seinna húsið skal hava størri dýrd enn hitt fyrra - sigur HARRIN Gud herskaranna - og á hesum staði skal Eg geva frið - sigur HARRIN Gud herskaranna. 2,9.

Hetta er sláandi. Tá ið vit hugsa um, ta dýrd ið fylti hitt fyrra templið og eisini tabernaklið í oyðimørkini, vit hava verið inni á tí, hvussu Harrin sat uppi yvir kerúbunum, og dýrd hansara fylti templið, so gevur hetta versið her hjá Haggai okkum rúm til eftirtanka.

Uttan at gera nakrar útleggingar av hesum, kunnu vit lata hugan reika eitt sindur. Tað var í hesum templinum Jesus varð borin fram, og offur varð borið fram fyri hann. Himmalsins kongasonur hevði stigið so lágt, at hann varð menniskja, og offur mátti berast fram fyri hann. Foreldur hansara vóru so fátæk, at tey høvdu bert tvær turtildúvur ella tveir dúvuungar at bera fram. Tað var í hesum templinum, hann sæt í millum lærarарnar, bert tólv ára gamal, og bæði lurtaði eftir teimum og spurdi teir, so at øll undraðust yvir vit og svar hansara. Her var tað hann stóð og lærdi, og her var tað hann, aftaná at hava gjørt sær ein koyril, rak kríatúrini út, koyrdi umkoll borð teirra, sum seldu, og steðgaði øllum handilskapinum, sum teir høvdu drigið inn í templið. Mest av øllum, her var tað, at forhangið skrædnaði frá erva og niður í gjøgnum í somu løtu, Jesus doyði og opnaði vegin inn til Gud.

Á hesum staði skal eg geva frið, profeteraði Haggai, sum vit lósu beint nú. Harrin hevur gjørt frið millum seg og hvønn syndara. Eisini teg, tak hetta upp til eftirtanka, bíða ikki, vend tær til Harran Jesus nú beinanveg, tak í móti tí friði hann bíður tær.

Enn er náðihurðin opin, hvussu leingi verður tað,

Eingin veit frá tí at siga, tak mót Jesusi í dag.


Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo